Álit

í

løgtingsmáli nr. 118/2023: Uppskot til løgtingslóg um at veita landskassastuðul til Oyggjaleikirnar, sum verða í Føroyum í 2027

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 2. mai 2024 og eftir 1. viðgerð 7. mai 2024 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ítróttasamband Føroya og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum, men við ymiskum viðmerkingum.

Sólvit E. Nolsø, Jóhannis Joensen, Liljan Weihe, Erling Eidesgaard, Magnus Rasmussen og Bárður á Lakjuni hava hesar viðmerkingar:

Fegnast verður um, at líkindi eru fyri, at Oyggjaleikir umsíðir koma aftur til Føroya.

At okkara ítróttafólk fara at kappast á heimavølli og meta seg móti sínum javnlíkum úr øðrum oyggjasamfeløgum fer ivaleyst at birta lív í okkara úrmælingar at leggja inn undir seg fleiri heiðursmerkir.

Ítøkiliga verður í uppskotinum biðið um, at landið stuðlar leikunum við upp til 15 mió. kr., sum er upphæddin, ið manglar í fyri at hava vissu fyri, at leikirnir kunnu fáast til Føroya.

Samlaða fíggjarætlanin fyri Oyggjaleikir 2027 er 22 mió. kr. Mett verður, at 7 mió. kr. koma inn frá atgongumerkjasølu og stuðlum. Fleiri møguligir stuðlar hava longu víst áhuga í at verða við.

ÍSF fer at stovna eitt partafelag, sum skal skipa teirra leiklut í oyggjaleikunum. Rakstur, skipan, fyrireiking o.s.fr. av leikunum verður skipað av partafelagnum og ikki av ítróttasambandinum sjálvum, sum tó fer at eiga og reka felagið. Tað er sagt at vera vanlig mannagongd hjá ítróttasambondum, tá oyggjaleikir verða hildnir.

Tær 15 milliónirnar, sum landið eftir ætlan skal stuðla við, skulu millum annað brúkast at veita trygd fyri gisting, møguligt keyp av innbúgvi at innrætta hølir til gisting, ið ikki fæst á gistingarhúsum, marknaðarføring, samleika og annað.

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum biður um heimildina og skal lata stuðulin, og ÍSF skal lata roknskap inn til Almanna- og mentamálaráðið, so eftirlit kann førast.

Eftir ætlan verða tað 14 ítróttagreinar við á oyggjaleikunum í 2027. ÍSF hevur verið í samband við sambondini hjá fleiri ítróttagreinum fyri at tryggja sær, at tey eru før fyri at verða við. Higartil hava afturmeldingarnar verið góðar. Ítróttafeløgini og teirra sambond, sum luttaka á leikunum, skipa sjálvi fyri kappingunum í síni ítróttagrein, meðan ÍSF skal tryggja karmarnar kring leikirnar.

Altjóða oyggjaleikanevndin - International Island Games Association (IIGA) - hevur verið í Føroyum í apríl. Fundir vórðu hildnir við ÍSF og føroyskar myndugleikar, umframt at nevndin kannaði umstøðurnar í Føroyum at halda leikirnar.

Tað hevur fingið uppmerksemi, at tað ítøkiliga verður nevnt í viðmerkingunum, at leikirnir væntandi verða hildnir í Tórshavn, Vágum, Klaksvík og Runavík. Summi undrast á, at onnur økir í landinum ikki eru beinleiðis nevnd sum karmur um ítróttarkappingar. Suðuroyggin er fleiri ferðir nevnd sum eitt ítøkiligt dømi.

IIGA setur treytirnar og karmarnar kring oyggjaleikirnar, sum ÍSF so fylgir og arbeiðir eftir. Har stendur millum annað í skipanarvegleiðingini hjá IIGA, at ein miðstøð skal vera fyri leikirnar, sum kappingarnar skulu vera so nær við sum gjørligt. Sannlíkt verður tann miðstøðin løgd í Havn, har flestu hentleikarnir og ítróttarmiðstøðirnar eru.

Hetta er mannagongdin, tí IIGA vil hava, at leikirnir skulu bæði verða eitt ítróttartiltak og ein felagsskapur millum fólkini, sum er so tættur sum gjørligt, og har tað er lætt og skjótt at ferðast millum tey ymsu støðini.

Sama verður gjørt á oyggjaleikunum, sum verða hildnir í Orknoyggjum næsta ár, har flestu tiltøk og kappingar verða hildnar í Kirkwall og har á leiðini.

ÍSF hevur longu viðmerkt, at í tann mun tað letur seg gera kann væntast, at tiltøk verða hildin aðrastaðni í landinum enn í teimum viðmerktu økjunum. Tað væntar Mentanarnevndin eisini, at ÍSF ger sítt til.

Kannast skal um møguligt er at sjónvarpa so nógv sum gjørligt, helst á alnótini, so oyggjabúgvar, ið ikki hava møguleika at koma til Føroya, eisini hava møguleika at fylgja við, tá teirra ítróttafólk kappast. Tað er ein góð ætlan, tí so nógv sum gjørligt skulu helst kunna fylgja við.

Oyggjaleikir eru ein góður møguleiki hjá Føroyum at vísa seg sum ein góðan vert fyri túsundtals fólkum, íðkarum og ferðafólki annars, sum sannlíkt koma til Føroya í sambandi við leikirnar. Sannlíkt verður tørvur á millum 1.200 og 1.500 sjálvbodnum eisini, so fleiri føroyingar hava møguleika at taka lut; eisini tey, ið ikki íðka ítrótt, men sum annars vilja taka lut.

Umframt tað ítróttarliga framtakið, sum hetta er, liggja eisini vinnuligir møguleikar í leikunum, tí væntandi koma eini 4.000 fólk til Føroya í døgunum, tá leikirnir verða hildnir. 3.000 hava tilknýti til ítróttina, og restin eru ferðafólk. Hetta eru tøl, sum eru gjørd út frá royndunum, sum aðrir oyggjabólkar í okkara øki hava gjørt sær.

Upplagt er til dømis, at hetta kann verða til fyrimunar fyri gistingarhúsini, sølur av ymsum slag, ferðavinnuna í breiðum høpi, umframt at onkur sær aðrar møguleikar í hesum, sum ikki eru í dag.

Súsanna Bertholdsen hevur hesar viðmerkingar:
Saman við hinum limunum í Mentanarnevndini fegnast undirritaða um, at Oyggjaleikir eftir ætlan aftur verða hildnir í Føroyum í 2027. Undirritaða kann tó ikki góðtaka, at Suðuroyggin verður vald frá at hýsa pørtum av leikunum uttan yvirhøvur at hava fingið møguleikan at bjóða seg fram, og hevur tí valt at gera sínar egnu viðmerkingar til málið.

Undirritaða kann ikki góðtaka neiliga hugburðin mótvegis Suðuroynni og neiligu søguforteljingina um Suðuroynna, sum bæði landsins myndugleikar og felagsskapir, sum annars siga seg at vera fyri alt landið, eru við til at breiða út og halda lív í. Tá okkurt verður sagt nóg ofta, so verður tað sannleikin, og um eingin mótmælir, so verður tað standandi einsamalt.

ÍSF er hægsti felagsskapur innan ítróttarvirksemi í Føroyum og eitt av endamálunum er at leggja til rættis føroyska luttøku í Oyggjaleikunum og virka fyri, at hesir verða hildnir í Føroyum. Eitt annað endamál er at seta í gongd og skipa fyri tiltøkum at breiða út ítróttina til øll fólk.

Altjóða oyggjaleikanevndin, International Island Games Association (IIGA), var í Føroyum í apríl. Fundir vórðu hildnir við ÍSF og føroyskar myndugleikar og nevndin kannaði frammanundan valdar umstøður at halda leikirnar í Føroyum. Vitjað varð als ikki í Suðuroynni, so Suðuroyggin varð frávald uttan at fáa møguleikan at bjóða seg fram og vísa á, hvussu góðar umstøðurnar eru at hýsa onkrum av kappingunum.

Kanska eru allarbestu umstøður í landinum at hýsa t.d. borðtennis í ítróttarhøllini á Tvøroyri, sum er ein av snøggastu og best hildnu hallunum í Føroyum. Nakrir av bestu borðtennisleikarunum í Føroyum hava vant í júst hesi høll og er borðtennissøgan á Tvøroyri bæði drúgv og rík við sera góðum úrslitum at vísa á. Hetta er bert eitt dømi.

Nakrir av bestu føroysku svimjarunum eru úr Suðuroynni og í Vági er Páls Høll, sum er fyrsti 50 metra svimjihylur. Marghøllin, tann einasta av sínum slag, er eisini í Vági. Umframt eru fleiri aðrar ítróttar- og fimleikahallir og sera góðir fótbóltsvallir við framúr kringumstøðum, men alt hetta fekk altjóða oyggjaleikanevndin als ikki møguleika at síggja og taka støðu til.

Grundgevingin er frástøðan. Tað kom fram undir hoyringunum, at IIGA hevur eitt stórt ynski um, at tað ikki skal taka meira enn 1 tíma at ferðast út til ymsu støðini, har kappingarnar verða, men tað er ikki ein treyt.

Vit eru framvegis eitt oyggjasamfelag, tað eitur oyggjaleikir, og so leingi Suðuroyggin ikki hevur fingið fast samband, so tekur tað 2 tímar at sigla, men tað er ikki ein haldgóð grundgeving fyri, at Suðuroyggin ikki eisini kann verða ein virkin partur av oyggjaleikunum.

Øll økið í landinum, har tað nú er koyrandi til, tí okkara infrakervi er so væl útbygt, eru nevnd jaligt í viðmerkingunum til uppskotið.

Suðuroyggin, har tað búgva 8% av Føroya fólki, sleppur als ikki upp í part, og henda hugburðin kann undirritaða sum suðuroyingur ikki góðtaka.

Við hesum ymisku viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 13. mai 2024

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	